HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Týsdagin, 3. mai 2016 kl. 16:30

Á fundinum vóru: Una Matras, Birgir Kass, Jógvan Arge og Manne Persson
Avboð: Karin Dahl og Bjørghild Djurhuus
Skrivari: Hans Jón Thomsen

Skrá

Nýtt frá leiðslu/skúla:
Kunnað varð um komandi skeltingina í Hoyvíkar skúla. Fýra nýggj skelti vera sett ymsastaðni á Hoyvíkar skúla. Eitt verður við høvuðsinngongdina, eitt vestan fyri skúlan við kirkjuna og tvey á "Lítla skúla". Eisini er komið skelting við parkeringsforboðið í skúlagarðinum.
Hoyvíkar skúli hevur fingið nýtt innbúgv. Pyramiduhøllin er prýdd við nýggjum benkrum, krakkum og borðum. Eisini er felagshøli við høvuðsinngongdina prýtt við sofu, benkrum og borðum.
Allar starvsfólkasamrøðurnar í Hoyvíkar skúla vórðu avgreiddar í mars/apríl 2016.

Nýtt frá lærarum:
Manne Persson gjørdi vart við, at lærarar vildu hava at vita, hvat er at rokna sum skúlans øki. Hetta verður kunnað um á seinasta námsfrøðiliga fundinum í skúlaárinum.

Nýtt frá Tórshavnar kommunu:
200.000 kr. eru játtaðar til útiøki í Hoyvíkar skúla. Játtanin er samtykt undir 1. viðgerð í Tórshavnar kommunu. Væntast kann, at peningurin er játtaður áðrenn summarfrítíðina. Peningurin er funnin á ymsum rakstrarkontum fyri 2015.

Nýtt frá foreldraumboðunum:
Foreldraumboðini í skúlastýrinum heita á skúlaleiðsluna við ynski um at arbeiða fram ímóti at fáa ein felags telefonpolitik fyri Hoyvíkar skúla.
Ætlaði skúlastýrisfundurin fyri foreldrunum verður tikin burtur hetta skúlaárið.

Fundurin lokin kl. 18:10